# Danskur ljóðserfrøðingur á Summarfestivalinum 2007



Eddy Bøgh Brixen er ráðgevi innan elektroakustiska økið og hevur veitt frálæru innan ljóð til eitt nú Rútmiska Konservatoriið, Danmarks Radio, Det Kongelige Teater, Danska Filmskúlan og mong onnur virki og feløg. Ljóðserfrøðingurin, sum í 1979 stovnaði fyritøkuna EBB-Consult heldur nógv skeið innan sína lærugrein og hevur skrivað fleiri bøkur um ljóð og ljóðviðurskifti. Eddy Bøgh Brixen, sum mikukvøldið 1.august fer at hava fyrilestur í Atlantis í Klaksvík um stór konsertannlegg, fer eisini at virka sum ljóðkonsulentur á Summarfestivalinum í ár.

# Nýggj super-trio

Ein trio uttan sín líka í føroyskum tónleiki. Frálíkir sangarar, framúr sangskrivarar og sera dugnaligir á palli. Eyðun Nolsøe, Terji Rasmussen og Kim Hansen hava funnið saman til eina heilt serliga og eksklusiva framførslu á Summar Festivalinum. Teir fara at syngja og spæla sínar bestu sangir, og tað eru sanniliga sangir, ið fólk kenna aftur. Eyðun, Terji og Kim hava skrivað sangir sum 80'ini, Mítt Land, Eros, Eg flýggi til tónleikin, Meistarin og nógvar, nógvar aðrar sangir. Teir hava drúgvar royndir sum tónleikarar á palli, og sum trio verða teir ikki tiknir. Komið og syngið við til nøkur av størstu hittunum í føroyskum popptónleiki! Framførslan hjá Eyðun, Terji og Kim verður á midnátt leygarkvøldið.

# Ommudiddan verður við

**Trøllapætur og tey eru sjálvandi aftur við á Summar Festivalinum. Og hesa ferð er ommudiddan eisini við**

SUMMAR FESTIVALUR
*Tíðindaskriv*



*Eins og trøllini, so fara Angela og Hannibal eisini at roksast á pallinum, tá Summar Festivalurin fer ígongd*

Børnini skulu sjálvandi eisini hava sítt, nú Summar Festivalurin stendur fyri framman. Gerðabøur verður í hesum døgum broyttur til Silvaland, og har verður mangt og hvat hjá børnum og barnsligum sálum at stytta sær stundir við.

Eitt nú hevur ommudidd hjá Trøllapæturi sagt frá, at hon hevur hoyrt so nógv gott um festivalin, og tí vil hon eisini sleppa á pall saman við hinum trøllunum. Og sum skilst, so er hon í minsta lagi líka garvill sum systir sín, so tað fer neyvan at ganga friðarliga fyri seg.

### Angela og Hannebal

Visti tú, at Angela og Hannibal eru sum øll onnur børn í Føroyum? Tey duga at skapa sær, spæla klovn og finna uppá alt møguligt. Eftir ein alt ov langan steðg, so eru tey aftur farin at undirhalda og skipa fyri barnatiltøkum. Og sjálvandi verða Angela og Hannibal á Silvapallinum fríggjadagin, tá ið festin fyri teimum minstu festivalgestunum verður. Og tað verður við sangi, skemti og nógvum ruðuleika, júst sum børnini vilja hava tað.

### Gykl og eldblásing

Hevur tú hoyrt um gyklarin Ábjørn og eldblásarin Óla?

Á dú, á dú. Tað ljóðar næstan vandamikið. Hugsa tær um Ásbjørn fer at ganda børnini burtur ella um Óli fer at blása eld eftir øllum børnunum, sum hava gloymt at busta tenn ella sum hava til óvana at renna undan mammu síni. Men tað er hvørki orsøk til at óttast ella leiða nakran vaksnan. Bæði gyklarin og eldblásarin eru góðir við børn, hóast teir duga ymisk løgin kynstur, sum ikki so nógvir pápar duga at gera teimum eftir.

### Ballónferð

Hvussu lagt uppí himmalin kunnu ballónirnar fara?

Ja, tað verður spennandi at vita!

Aftaná sjálvt undirhaldið fáa øll børnini fínar ballónir, sum skulu sleppa langt uppí luftina, soleiðis at øll síggja at nú letur Silvalandið upp og at Summarfestivalurin er byrjaður.

### Børnini fremst

Skulu tey minstu børnini ikki hava fyrsta rætt og tey allarbestu plássini?

Silvafestivalurin er allarmest fyri børn sum duga at ganga sjálvi og sum ikki ganga í skúla.

Hetta hevur Silvi hugsað um og tí verður skipað soleiðis fyri, at einans minni børn sleppa heilt nær pallinum og at vaksin fólk mugu gera seg pinkalítil, um tey skulu inn um gyrðingina saman við børnum undir skúlaaldri.

Men øll eru sjálvandi vælkomin til serligu konsertina og undirhaldið hjá Silva. Eisini skúlabørn og foreldur. Og tað verður ikki einans av pallinum at tingini henda. Nei, klovnar, gyklarar, trøll og aðrir herlig dýr og skapningar fara eisini at heilsa uppá børnini og sita ímillum áskoðarafjøldina.

# Sangskeið á Summar Festivalinum



Kristjana Stefánsdóttir, sum er sanglærari, verður við Jógvani Hansen á Sumar Festivalinum

Kristjana Stefánsdóttir hevur vunnið fleiri altjóða prísir og er víðagitin fyri sína sterku og vøkru jazzrødd. Hon er ein av kendastu tónlistafólkum Íslands og hevur eisini givið sínum landsmonnum góðar upplivingar á palli og hollan kunnleikan innan sangvenjing og sangteknik. Ein av hennara nýggjastu næmingum, er føroyingur Jógvan Hansen, sum vónar at sanghugaðir føroyingar fara at nýta gylta møguleikan at læra av íslendska meistaranum.

Skeiðið verður hildið í Atlantis í Klaksvík mikudagin og hósdagin, báðar dagarnar frá kl. 16 – 20 og frá mánadegnum verður høvið at tekna seg til skeiðið á heimasíðuni hjá Summarfestivalinum.

12 pláss eru tøk, har hvør einstaki næmingur fær persónliga undirvísing og røttu amboðini at menna røddina og sangevnini.

Eisini er møguleiki at fylgja skeiðinum, uttan tó at vera beinleiðis partur av hesum.

# Palli í Tøðuni 100 ár

## - Minningarrit



18.juli 2008 verða 100 ár, síðan Joen Pauli Thomasen, Palli í Tøðuni í Vági, varð føddur. Í hesum sambandi verður arbeitt við einum minningarriti, sum ætlandi kemur út næsta summar.

Palli í Tøðuni yrkti og skrivaði nógv, báði í bundnum og óbundnum máli undir navninum Ipt. Megin-parturin av skrivaða tilfarinum er til skjals, men alt er ikki skipað enn.

Vegna stigtakararnir til minningarritið heitir Arnfinnur Thomassen í Vági á fólk, sum møguliga eiga nakað av tilfari eftir Palla, ella kanska eina mynd av honum, um at seta seg í samband við seg. Arfinnur kann hittast á tlf 373043 ella arnftho@kallnet.fo